Landsnet aðalfundur

Fríggjadagin 25. januar 2013, kl. 11.45 - 15.30
Vit byrja á Restaurant 11 – Fundurin verður hildin í Fabrikkini hjá öSTRöM.

Kl. 11.45: Kalt borð á Restaurant 11, Tórsgøta 11.

Kl. 13.00: Vælkomin

Hilmar Høgenni, nevndarformaður

Formaðurin í nevndini fyri Landsnet og leiðslan í KT Landsins (KTL) hava gjørt skránna og biðið Berg Dam, nevndarlim, til orðstýrara, og Dánjal Paula Haraldsen, ráðgevi, at skipa fyri tí parti av skránni, har luttakararnir viðgera framløgurnar ("Tutl").

Kl. 13.10: Formansins frágreiðing

Hilmar greiðir frá málum, sum nevndin hevur arbeitt við í 2012. Sambært viðtøkunum tilnevnir hvørt aðalráð ein lim til nevndina fyri Landsnet eftir aðalfundin.

***Tutl**: 3 minuttir prát við borðini um framløguna. Skriva á gular seðlar, sum vit savna saman.*

Kl. 13.30: Landsnet komið fyri at vera!

Leif Abrahamsen, stjóri á Gjaldstovuni

Gjaldstovan yvirtók ábyrgdina av Landsneti í 2009 og setti sær nøkur mál. Leif tekur saman um og lýsir støðuna, nú talið av brúkarum er farið um 1.500.

13.40: Mál og ætlanir næstu árini

Nicolai Balle, deildarstjóri, KTL

Komið verður inn á strategi og ætlan fyri menning, rakstur og innliming á Landsneti.

Tutl 3 min.

14.00: Windows 8 og Office 2013

Birgir av Steinum, rakstrarleiðari, KTL

Greitt verður frá, hvat krevst av kompatibiliteti við fakskipanir, so sum 360, TotalView og BSL, hvørjar broytingar í funktionaliteti eru í væntu, og nær Windows 8 og Office 2013 verður tøkt hjá brúkarum á Landsneti.

14.10: Sharepoint loysnir í Føroyum

Nicolai Balle, Elektron og NEMA

Víst verða Kunngerðaportalurin og projektportal-loysn hjá Gjaldstovuni, sum koyrir á Landsneti, og eina journalskipan frá Elektron, sum bankarnir brúka.

Tutl 3 min

Kl. 14.30: Nýggj tænasta á Landsneti: Lync

Birgir av Steinum og Formula

Lync er tænasta, sum Landnet fer at bjóða. Lync sameinir starvsfólkayvirlit, tjatt, videofundir, telefoni, kalendara og teldupost. KTL fremur í løtuni eina pilotverkætlan, har vit í næstum fara at bjóða útvaldum stovnum at royna loysnina.

Tutl 3 min.

14.45 ---------- S T E Ð G U R ----------

Her verður høvi at fáa kaffi og okkurt afturvið til borðini, fáa fríska luft og hitta fólk.

Gulir seðlar, verða savnaðir saman og greinaðir av teimum, ið hava haft framløgur.

Kl. 15.00: Viðgerð av tutli

Dánjal Pauli Haraldsen, ráðgevi

Evnini verða nærri viðgjørd av teimum, ið hava hildið framløgur.

15.20: Hvønn veg fara vit á KT-økinum?

Bjarni A. Bjarnason, Aðalstjóri, FMR

Nýggi aðalstjórin fer at tosa um hvussu hann sær fyri sær menningina av KT innan tað almenna næstu árini.

15.30: Samanumtøka

Hilmar Høgenni; Nevndarformaður

***Um Landsnet:** Landsnet er miðsavnað KT-tænasta, ætlað øllum almennum stovnum. Endamálið við Landsneti er at virka fyri einari effektivari og tryggari KT-nýtslu í almennu fyrisitingini. Við at gerast partur av Landsneti, fær stovnurin útveitt allan sín KT-infrastruktur, og skal ikki sjálvur taka sær av hýsing, backup, trygd á servarum og teldum, netsambandi (kaðal og tráðleyst), support, keyp og uppseting av teldum og servarum og keyp av standard-lisensum. Á Landsneti verður stovnurin partur av **einum** miðsavnaðum tøkniligum palli, sum ger samstarv tvørtur um stovnsmørk munandi lættari. Landsnet verður framhaldandi ment, og stovnurin fær tískil eisini tilboð um atgongd til nýggjar tænastur.*